# Annika framvegis forkvinna

AMNESTY INTERNATIONAL
*Tíðndaskriv*

Tveir nevndarlimir stóðu fyri vali á aðalfundinum, sum var á Landsbókasavninum 18. apríl. Hildur Patursson varð aftur-vald, meðan Anna Maria Persson ikki stillaði upp aftur, eftir at hon síðsta árið hevur tikið enn eitt tørn sum nevndarlimur. Ongin varð valdur í hennara stað, so í løtuni hevur nevndin einans 4 limir. Til tiltakslimir vóru valdar Maria Heradóttir og Jórun Arge.

Á fundi í síðstu viku skipaði nýggja nevndin seg við Anniku Sølvará sum forkvinnu, Jette Hoydal sum næstforkvinnu, Erling Isholm sum kassameistara og Hildur Patursson sum nevndarlimi.

Nevndin er farin undir at leggja arbeiðið komandi árið til rættis. Á heimasíðu felagsins http://www.amnesty.fo ber til at lesa ársfrágreiðingina fyri farna árið, sum varð løgd fram á aðalfundinum, umframt hópin av øðrum tilfari um Amnesty International og mannarættindi, sigur Amnesty International Føroya Deild.





# Altjóða Apopleksidagurin hildin á Torginum í SMS

HEILADAGUR
*Tíðindaskriv frá SMS*

Eisini verður íslendski happadrátturin DAS á Torginum í hesi vikuni Altjóða Apopleksidagur er 10. mei, og hendan dagin verður Heilafelagið eisini 5 ár. Heilafelagið – felagið fyri apopleksi- og afasirakt - heldur dagin við at vera á Torginum í SMS fríggjadagin 10. mei og leygardagin 11. mei.

Apopleksi er felagsheiti fyri blóðtøpp í heilanum og heilabløðing. Sjúkueyðkennini eru tengd at tí rakta økinum, og tey raktur kunnu t.d. vera lamin øðrumegin, hava talutrupulleikar, kennitrupulleikar, sjónarórógv og broyttan persónleika. Mett verður, at í Føroyum verða uml. 100 fólk um árið rakt av apopleksi.

Heilafelagið fer at hava við sær upplýsandi tilfar um apopleksi hesar báðar dagarnar, og tey vitjandi sleppa við ymiskum royndum at fáa eina kenslu av, hvussu tað er at vera raktur av apopleksi. Eisini verður møguleiki at fáa blóðtrýstið kanna, tí ov høgt blóðtrýst kann elva til apopleksi.

Jógvan Telling fer á pallin fríggjadagin kl. 17.00 og leygardagin kl. 13.00 at syngja gamlar kenningar. Jógvan er næstformaður í Heilafelagnum og varð sjálvur raktur av apopleksi fyri 8 árum síðan. Jógvan hevur afasi (talutrupulleikar), men sum hjá fleiri øðrum afasiraktum, gongur væl at syngja.

Heilafelagið skipar eisini fyri góðum mattombola. Fríggjadagurin 10. og leygardagurin 11. mei verða sostatt tveir spennandi dagar á Torginum við nógvum forvitnisligum á skránni.

Sum so ofta í SMS er Torgið í SMS nógv uppttikið, og hendan vikan er einki undantak. Týsdagin lat íslendski happadrátturin DAS eisini eitt tiltak upp í SMS, har teir m.a. fara at marknaðarføra nýggja dráttin, sum byrjar í mei mánaða. Eisini draga teir lut um ymsar vinningar alla vikuna. Men tað krevur, at tú vitjar básin hjá teimum á Torginum. Tiltakið hjá teimum er opið til leygardagin.

# Marjun Sigurðsdóttir forkvinna í MBF

Meginfelag teirra brekaðu hevði aðalfund leygardagin. Á fundinum fór forkvinnan seinastu átta árini, Doris Hansen, frá. Í hennara stað varð vald Marjun Sigurðsdóttir

Í Starvsnevndini sita nú um framt forkvinnuna, Leila Solmunde fyri rørslubólkin, næstforkvinna. Randfríð Sørensen fyri bólkin medisinsk brek, peningarøkil. Maria Andersen fyri bólkin sálarlig-/neurologisk brek, nevndarlimur og Maria Ellefsen Næs fyri bólkin samskiftisbrek, nevndarlimur.

Fyribils verður forkvinnan at hitta týsdagar.



*Marjun Sigurðsdóttir bleiv vald til forkvinnu hjá MBF, eftir at Doris Hansen fór frá aftaná 8 ár sum forkvinna.*


**Hjartans tøkk fyri stuðul tykkara**



Eg vil veita eina persónliga tøkk til allar stillarar, øll valevni og øll tykkum sum valdu Sjálvstýrisflokkin á løgtingsvalinum

Eyðun Elttør
formaður



team85

Shetland Cruise 2002 summarið www.smyril-line.fo SMYRIL LINE Tel 34 59 00

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
úr einans ... 1.149,- fyri hvønn (í lágárstíð)



Gisting á vallaraheimi
úr einans ... 746,- fyri hvønn (í lágárstíð)



Privat gisting
úr einans ... 878,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo




# Løgmaður vil gera enda á verkfallinum

**Fyrisitingin hjá løgmanni er klár við einum lógaruppskoti, ið ger ein enda á verkfallinum hjá Skipara- og navigatørfelagnum. Seinasta semingsuppskotið verður við lóg samtykt eftir ætlan løgmans**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*

**Tórshavn:** Verkfallið stendur í skrivandi stund við. Men hendan støðan kann lættliga broytast. Um partarnir í trætuni ikki loysa støðuna sjálvir, so er løgmaður klárir at loysa fløkjuna.

Í Sosialinum í gjár sigur Hendrik Old, at hann heldur, at løgmaður eigur at leggja seg útí málið, soleiðis at ein loysn kann fáast á verkfallinum.

Løgmaður er alt annað enn glaður fyri støðuna, og fyrisitingin hjá løgmanni hevur fingið boð um at gera eitt uppskot til løgtingslóg, sum ger ein enda á verkfallinum.

– Eg havi biðið fyrisitingina fyrireika eitt uppskot, sum ger tað soleiðis, at semingsuppskotið verður viðtikið við lóg. Mær kunnugt er uppskotið longu klárt, sigur løgmaður, Anfinn Kallsberg.

Løgmaður er av teirri sannføring, at vilja partarnir í verkfallinum ikki gera ein enda á verkfallinum, so vil hann gera tað fyri teir. So leingi samráðingar enn eru, vil løgmaður ikki gera nakað.

Løgmaður veit ikki heilt at siga, nær hann kann kalla tingið saman, ella um hann fer at gera tað. Tingið skal tó hava tingfund mikudagin 15. mai, har hevur løgmaður so møguleikan at leggja uppskotið fyri tingið.

Tað er soleiðis, at løgmaður í sínum embæti ikki kann gera annað enn at heita á partarnar í ósemjuni um at seta við samráðingar ella royna at finna eina semju. Løgmaður ella annar landsstýris- ella løgtingsmaður kann leggja uppskot fyri tingið, ið er einasti myndugleiki, sum við lóg at gera enda á ósemjuni millum Fíggjarmálastýrið og Skipara- og navigatørfelagið.

Løgmaður hevur enn ikki tosað við hinar flokkarnar í Løgtinginum um uppskotið, ið hann ætlar at leggja fyri tingið. Hann hevur ikki meiriluta fyri uppskotinum bert við samgonguni, og hann má tí í andstøðuna at leita eftir stuðuli.

– Eg vil eisini virka fyri, at vit ikki koma í hesa støðuna aftur, tí konfliktin er óhaldbar og drepandi fyri útjaðaran, sigur Anfinn Kallsberg at enda.



*Í Havn liggja skipini bundin við bryggju, og tey vera eisini liggjandi sum støðan er nú. Anfinn Kallsberg ætlar nú at fara í Løgtingið við málinum*



*Anfinn Kallsberg vil gera ein enda á verkfallinum, sum hann heldur er drepandi fyri útjaðaran*





Hevur tú lagt ábyrgdarfæið um til partapening?

Vit hjálpa fegin við at fylla út neyðugu skjølini.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo